Frá rocktónleiki til svenska handilsketu

Signar í Homrum, sum var oddamaður í rockbólkinum Kjølar, býr nú í Svøríki, har hann er deildarleiðari í stórari handilsketu. Hóast stundir ikki eru til at spæla í bólki, skrivar Signar framvegis sangir, og hann arbeiðir við tónleiki á heimatelduni

– Sjálvur haldi eg, at tað at spæla til dans er vorðið sum nakað »tú ikki gert«, men tað sum tónleikarar ikki hugsa um er, at tað er har tú fært royndirnar at spæla leingi. Klárar tú at spæla til eitt brúdleyp í sjey ella átta tímar, so klárar tú tað mesta, sigur Signar í Homrum

TÓNLEIKUR
Pop.fo

Signar í Homrum var í fleiri ár ein av teimum mest sjónligu sangarunum í føroyskum rocktónleiki. Hann spældi í Kjølum, sum gjørdi nógv vart við seg - bæði á konsertum og á fløgu.

Seinastu árin hevur ikki nógv verið at hoyrt frá Signari, og tað er ein orsøk til tað. Signar er búsitandi í Svøríki, har hann hevur ikki somu stundir til tónleikin, sum hann plagdi at hava.

Hvat gert tú í Svøríki?

Eg arbeiði í einum stórmarknaði, sum er partur av samtakinum KF. Hetta svarar til FDB í Danmark. Føroyska keypsamtøkan er líknandi hugskot, har limirnir eiga samtakið. Mítt starv á stórmarknaðinum er at verða deildarleiðari fyri kundatænastu, kassaskipan, pengahandfaringini. Vit umseta fyri góðar 300 mió. um árið og royna tí at finna so góða skipan fyri kortgjaldi sum møguligt fyri at sleppa undan reiðum pening. Tá man hugsar um at vit hava okkurt um 60% kontant gjald, so kostar reiður peningur okkum nógv, bæði í trygd og arbeiði nógv, sigur Signar í Homrum.

Hvussu leingi ætlar tú at búgva í Svøríki?

– Fyribils hava eg og Eydna sagt tvey ár afturat, tí á várið 2003 skulu vit flyta í nýggjan stórmarknað. Handilin hjá okkum í dag er upp á umleið 8.000 fermetrar, og tann nýggi verður umleið 15.000 fermetrar, so tað ætli eg mær í hvussu so er at verða við til. Ikki minst lærdómurin í at byggja nakað upp frá einari tómari høll til eina vælvirkandi eind er spennandi uppgáva.

Hugsar um solofløgu

Hvat gert tú við tónleik?

– Eg havi verið við í tveimum bólkum, men tíverri røkkur ikki tíðin til, so tað at spæla í bólki er á bara til hugna í løtuni. Men eg siti heima og spæli, geri sangir og tekstir, og eg eri farin at arbeiða eitt sindur við tónleiki á teldu. Harumframt havi eg kannað eitt sindur, um tað hevði verið gjørtligt at selt onkran sang til okkurt plátufelag. Tað hevði verið stuttligt at roynt okkurt sovorðið.

Hvørjar ætlanir hevur tú við tónleiki?

– Seinni í heyst kundi eg hugsa mær at farið upp í onkran bólk, men tað er eitt sindur óvist júst nú. So er eisini planurin at geva fløgu út sjálvur, men har havi eg ikki gjørt av, nær tað fer at verða. Hugskotið aftanfyri fløguna havi eg klárt, og eg havi skrivað eini tvey løg, sum eg ætli mær at brúka til tað fløguna. So skal eg bara hava eini tíggju afturat...

Fylgir tú við í føroyskum tónleiki?

– Ja, at eg fylgi við í tíðindum, heimasíðum og ikki minst Pop.fo. Men eg havi verið rættiliga vánaligur at keypa føroyskar fløgur, so eg veit ikki rættiliga, hvørjir bólkar eru frammi beint nú. Nú All That Rain leitar eftir nýggjum sangara og gittarleikara, sær tað ikki út sum um tað er nakar konsertbólkur í gongd, og tað er spell, haldi eg.

– Sjálvur haldi eg, at tað at spæla til dans er vorðið sum nakað »tú ikki gert«, men tað sum tónleikarar ikki hugsa um er, at tað er har tú fært royndirnar at spæla leingi. Klárar tú at spæla til eitt brúdleyp í sjey ella átta tímar, so klárar tú tað mesta. Og tað sum ræður um, er at spæla so nógv sum gjørligt, ta tíðina bólkurin skal sjóðast saman.

Kunnu vit vænta at síggja teg aftur á føroyskum palli?

– Ja, tað vóni eg. Eg havi sum so ikki samband við nakran bólk í Føroyum, meira enn "gomlu Kjølarnar", men mær dámar væl at spæla tónleik, so okkurt fer ivaleyst at verða onkuntíð. Og skuldi okkurt serligt tiltak komið framvið, so er ikki óhugsandi at eg hevði havt hug til tað.

Løgfrøðingur til Føroya Tele

"Tað tryplasta í lívinum, er at vita, hvørja brúgv ein skal fara yvirum, og hvørja brúgv ein skal brenna"

David Russell



Samskiltið við onnur vaksur dag um dag, og fjarskifti er vorðið eitt lykilorð í einum framkomnum samfelag. Á Føroya Tele taka vit við gleði ímóti teimum avbjóðingum, sum av hesum standa, og fyri at standa so vel búgvin sum tí ber, mugu leiðsla og starvsfólk kunna fáa góða veglsiðing.

Føroya Tele stendur fyri at viðka um løgfrøðiligu stápin. Arbeiðsuppgávur, sum liggja fyri framman eru sera fjølbroyttar, men liggja tó mest innanfyri almennan vinnulívsrætti, m.a. innan fjarskifti, kapping og KT.

Hvønn dag stinga nógvir innanhýsis og utanhýsis løgfrøðiligir spurningar seg upp, sum krevja skjóta og góða viðgerð. At arbeiða saman við verandi løgfrøðingi okkara, søkja vit tí eftir einum løgfrøðingi aftrat.

Tað er ein fyrimunur um tú hevur:
- arbeiðsroyndir úr líknandi starvi
- góðan farleika í føroyskum, donskum og enskum í skrivt og talu
- samráðingarroyndir
- edv- farleika á brúkarastøði
- góð samstarvsevni, umframt farleika at arbeiða sjálvstøðugt

Føroya Tele kann bjóða eitt starv í einum mennandi umhvørvi við
- fakligari og persónligari menning
- endurútbúgvingar- og skeiðmøguleikum
- góðum arbeiðsumhvørvi
- mauleika at leggja arbeiðstíðirnar tí rættis eftir persónligum tarvi

Løn og setanarviðurskifti verða sambært avtalu. Arbeiðsstaður er Føroya Tele í Tórshavn.

Eftir nýggjár latur Føroya Tele upp eognan integreraðan dagstovn í samstarv við Tórshavnar Kommunu, har starvsfólk á Føroya Tele hava framlhjárætt til ansingarplass.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Jens Wang, løgfrøðing, á beinleiðis tel 303377 ella til Starvsfólkadeildina á tel 303030.

Umsókn við avriti av prógvum og møguligum ummælum, skal vera Føroya Tele í hendi í seinsta lagi frígjadagin 19. oktobur 2001 og skal sendast til:

Føroya Tele
Starvsfólkadeildin
Box 27
110 Tórshavn

Føroya Tele er partafelag, ið Føroya Landsstýrið eigur 100%. Sum Føroya stórsta fjarskiftisfyritøka hevur Føroya Tele ábyrgdina av meginpartinum av fjarskiftisflutningunum í Føroyum. Nettosølan var í 2000 kr. 242 mió. Á Føroya Tele arbeiða 250 fólk í 30 deildum á 14 ymiskum støðum kringa alt landið.

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum!

TIL
TILBOÐ
3 5
TILBOÐ
1
TILBOÐ
5
TILBOÐ
2 5
TILBOÐ
1 5
TILBOÐ
1 5
TILBOÐ
1